## HEILSANIR



**Góðu Jórun og Trygvi**
Eftir 20 ár gingu tit endiliga saman í hjúnalag. Hjartaliga tillukku við degnum 20. okt.
**Ynskja systkini við familju**



**Góði tit bæði**
Tillukku við hjúnabandinum 20. okt. Góðan túr til Danmarkar. Alt tað besa ynskja vit tykkum.
**Vit øll**



Hendan heilsan er til hesi 5 fitti systkini í Klaksvík, sum hava, og hava havt ein serligan dag í heyst. Malan, sum fyllir 65 ár 17. okt., Óli Jall og Elsa, sum hava silvurbrúdleyp 24. okt, Hanus, sum fylti 60 ár 10. okt, Julianna, sum fylti 55 ár 28. sept. Ása fær eisini eina heilsan. Hjartaliga tillukku øll somul og Guds signing.
**Ynskja vit á Skáltavegnum**



Hvør skuldi trúð, at hesar damurnar vóru 45 ár 17. okt. Hjartaliga tillukku við degnum.
**Bestu ynskir mamma, systkin við familju**



**Góða Paulina**
Hjartaliga tillukku við 4 ára føðingardegnum.
**Ynskja omma og abbi**



**Góði Hákun**
Øll góð ynskir á 5 ára føðingardegnum.
**Frá abba í Havn**



**Góði fitti Helgi**
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum 18. okt. Eg elski teg.
**Heilsan fastur**



**Góði elskaði babba**
Hjartaliga tillukku við 40 ára føðingardegnum. Vónandi fáa tú og mamma ein góðan túr. Vit síggjast.
**Heilsan Høgni, Bjørt og Sveinur**

Sosialurin
Heilsanir
kr. 30,-
**Gevið gætur**
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00
**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
☐ Týsd. ☐ Mikud. ☐ Hósd. ☐ Fríggjad. ☐ Leygard.
Tekstur: ______________________________
______________________________
______________________________
______________________________
______________________________
______________________________
______________________________
______________________________
**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navnið og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.
Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ______________________________
Bústaður: ______________________________
Bygd/býur: ____________________ Tlf.: __________
Sendið lepan, vmynd og gjald til:
Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<

# Konsertir við Souvenirs, Julie Maria og Páll Finnur Páll

**Í næstu viku verða tríggjar spennandi konsertir við donsku tónleikabólkunum Souvenirs og Julie Maria, og okkara egna Páll Finnur Páll. Konsertirnar eru tær fyrstu í eini røð av konsertum við føroyskum og donskum tónleikabólkum, sum Norðurlandahúsið skipar fyri í vetur**

KONSERT
*tíðindaskriv*

Lagt er upp til tríggjar festligar og undirhaldandi konsertir í Atlantis, Lærarskúlahøllini og Mentanarhúsinum, tá bæði Souvenirs, Julie Maria og Páll Finnur Páll fara at hava framførslu á somu konsertum. Poppbólkurin Souvenirs við sínum fangandi, løttu popploøgum man nokk fáa teir flestu av áhoyrarunum at syngja við uppá sangir sum "Jeg hader Susanne", "Danse i måneskin" og "Jeg troed' du var hos Mikael". Tað sama man Páll Finnur Páll við løgum um "Tann forelskaða sjónleikaran" og "Herbergið". Unga evnaliga singersongwriter sangarinnan Julie Maria verður eisini eitt spennandi innslag á konsertunum við sínum serstaka jazz-poppi.

Í vetur verða íalt seks konsertir við føroyskum og donskum tónleikabólkum ymsa staðni í Føroyum. Konsertirnar eru fyriskipaðar í felag av Norðurlandahúsinum, FUT (Føroya Undirhalds Tónleikarafelag), DJBFA (Dansk Jazz Beat & Folkemusik Autorer) og DAT (Dansk Artist Forbund), og eru stuðlaðar av Atlantic Airways. Endamálið við konsertferðunum er at geva tónleikabólkum úr báðum londunum høvið at koma út um landoddarnar at spæla tónleik, og næsta ár er sostatt ætlanin, at føroyskir bólkar skulu fáa høvið at fara á konsertferð við donskum bólkum í Danmark.

Tað var stórur gravgangur hjá donskum tónleikabólkum eftir at sleppa til Føroyar á konsertferð, og heili 80 tónleikabólkar sendu umsókn til DJBFA og DAF um at sleppa við. Norðurlandahúsið og FUT hava síðani valt føroyskar bólkar út, sum skulu spæla saman við teimum donsku bólkunum. Bólkarnir, sum fara at spæla í Føroyum í vetur, koma at spæla nógvan ymiskan tónleik, og vit kunnu sostatt vænta okkum bæði popp, rokk, jazz og annað.

Konsertirnar við Souvenirs, Julie Maria og Páll Finnur Páll verða mikukvøldið 26. oktober í Atlantis í Klaksvík, hóskvøldið 27. oktober í Lærarskúlahøllini í Havn, og fríggjakvøldið 28. oktober í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Atgongumerki á 125 kr fáast í Atlantis og Shell í Klaksvík, Norðurlandahúsinum, og Kunningarstovunum í Havn, Runavík og Fuglafirði.